## FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ

Hoydalar • FO-188 Hoyvík
Tlf. 312973 • Fax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: kl. 8.00-15.00

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2006 at rokna **4-6 føst størv** leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við hesum lærugreinum:

**enskt, filmur/sjónvarp, heimspeki, ítróttur, latín, leiklist, lívfrøði, støddfrøði og týskt.**

Harumframt eru **6-8 ársvikariat** í lærugreinunum:

**alis/evnafrøði, alisfrøði, danskt, enskt, franskt, føroyskt, geografi, ítróttur, lívfrøði, sálarfrøði, samfelagsfrøði, spanskt, støddfrøði, søga og russiskt.** (møguliga saman við eini av lærugreinunum sum nevndar eru undir føstu størvunum)

Umsøkjarar við øðrum royndum sum t.d. lestrarvegleiðing, verða bidnir at upplýsa hetta.

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2006. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin - gevið gætur - upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað og sent til

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið,**
att.: Mads A. Winther, rektari, Hoydalar,
FO – 188 Hoyvík, Føroyar

í seinasta lagi 8. mai 2006.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

## Navnakapping

Í samband við at barnagarður verður bygdur í Sørvági, verður útskrivað navnakapping til barnagarðin.

Uppskotini skulu skrivast á ein lepa og leggjast í ein brævbjálva við frámerki á. Gott hevði verið, um ein frágreiðing um, hví júst hetta navnið er hóskandi til barnagarðin, fylgir við.

Avsendari skal ikki skrivast á brævbjálvan.

Í ein annan brævbjálva, við sama frámerki, skal navnið á tí, ið eigur uppskotið skrivast.

Merki brævbjálvan "NAVNAKAPPING".

Uppskotini skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1.juli 2006.

Kommunustýrið skilar sær rætt til ikki at brúka nakað uppskot.

Velur kommunustýrið eitt uppskot, fær vinnarin 5.000,oo kr. í virðisløn.

Eru tað fleiri. ið hava sama uppskot, verður lutakast millum tey, sum hava vinnarauppskotið.

Navnið verður avdúkað, tá barnagarðurin letur upp.

Sørvágs Kommuna
Att.: Gitta av Kák
Varðagøta 8
380 Sørvágur

## Starv í fíggjarumsitingini

Landsbankin søkir eftir einum fólki til fíggjarumsitingina at byrja skjótast gjørligt

**Arbeiðsuppgávur:**
- Íløgur og peningamarknaður
- Gjaldførisrøkt
- Peningastovnsavgreiðslur
- Back-office
- Roknskapur og fíggjarætlan

Uppgávurnar í bankanum eru býttar í arbeiðsøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki:**
Praktiskar royndir og viðkomandi útbúgving eru neyðugar.

**Løn:**
Eftir avtalu við støði í sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Tíðarfreist o.a.:**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra, tel 308126 sigurd@landsbank.fo ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra, tel 318122 jem@landsbank.fo um fleiri upplýsingar.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir sendast landsbankanum áðrenn 19.05.2006 kl. 16.00.

**LANDSBANKI FØROYA**
Governmental Bank
Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna landsbank.fo*

ENDURLÝSING

**Mentamálaráðið**
FÓLKASKÚLADEILDIN

**Mentamálaráðið søkir eftir útoyggjalærara**
Niðanfyri nevnda starv verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2006:

**Útoyggjalærari í Mykines Skúla**

Umsóknarfreistin er týsdagin 16. mai 2006 kl. 16.00.
Meira fæst at vita um størvini á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)

**Mentamálaráðið**